# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



## Til minnis um pápa og verpápa okkara

# Hartvig Poulsen í Vági

**f. 23. mars 1932 - d. 7. august 2009**

*Hendan vakra summardag*
*ikki vardi okkum tað.*
*At tú fara skuldi tá*
*burtur hagan foldum frá.*

*Ikki verður eftirspurt,*
*nær vit verða tikin burt.*
*Lívstráðurin slitnar brátt,*
*dagur verður ævig nátt.*

*Missa teg, tað er so svárt,*
*tómrúmið her verður stórt.*
*Saknurin so stórur er,*
*sorgarbundnan okkum ger.*

*Tó vit eiga minnir kær,*
*góður okkum øllum var.*
*Kærleika og troyst gavst tú,*
*gott tað er at eiga nú.*

*Nú ið rødd tín tagnað er,*
*ei vit siggjast meira her.*
*Men vit vilja takka tær,*
*alt tú fyri okkum var.*

*Komin er nú deyðans stund,*
*sova mást tú søtan blund.*
*Jesuspápi ver tær við,*
*góði pabba hvíl í frið.*

**Børn og svigarbørn**




*Tey trý starvsfólkini í Fotostudio f.v.: Finnur Justinussen, Per á Hædd og Helena Dam*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Frá Per á Hædd til Fotostudio

Fotoatelierið hjá Per á Hædd við Sundsvegin eitur nú Fotostudio. Tað eru fotografarnir Per á Hædd og Finnur Justinussen, sum eiga og reka fyritøkuna, sum varð stovnað í 1982, tá Per byrjaði at arbeiða sum sjálvstøðugur fotografur.

Fyritøkan hevur eisini fingið nýtt búmerki, sum ítøkiliga ímyndar ein »kameralukkara« og samstundis eisini er ímyndin av eitt nú ferð, blómum og tí sum sprettur og grør.

Upp á fyrispurningin um, hví teir hava tikið júst hetta stigið, siga teir Per og Finnur at kappingin er økt mun-andi, eins og tíðin er øðrvísi í dag, har talgilda tøknin av álvara hevur gjørt vart við seg. Við tveimum royndum fotografum, ið hava royndir á ymiskum økjum, kunnu vit av álvara fevna yvir allar uppgávur og avbjóðingar.

Umframt Per og Finn arbeiðir eisini Helena Dam í fyritøkuni. Helena hevur drúgvar royndir í fotobransjuni. Hon starvast sum fotoassistentur, ið eitt nú umfatar myndaviðgerð á teldu.

*mg*

† 

## Andlát og jarðarferðir

**Lotta Vest Joensen í Vági** andaðist týsdagin á Suðuroyar Sjúrkshúsi, 82 ára gomul.

## Dagurin

3. september. Seraphia. Kristin trælkvinna úr Sýriulandi, sum varð hálshøgd fyri trúar sakir.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

## Brúdleyp

Leygardagin 5. sept. kl. 12.00 giftast í Skopunar kirkju Jacoba Winther og Jón Tór Baldvinsson, Skopun. Veitslan verður kl. 18.00 í Samljóð í Skopun. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, kunnu siga frá á tlf. 259320 ella 213777 innan hóskvøldið 3. sept.





# Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá elskaða sonur og beiggi okkara

**Nicodemus Nicodemussen**
Demmus
Sandur

andaðist og var jarðaður.
Eina stóra tøkk til starvsfólki á Áargarði, sum tóku sær so væl av honum.
Tøkk til Jákup Reinert Hansen, prest, fyri troystarríkorð á Áargarði og í kirkjuni.
Tøkk fyri blómur og kransar, heilsanir og peningagávur til Áargarð.
Tøkk til tykkum øll, gravarar, berarar og sangarar og øllum tykkum, sum hjálptu til við jarðarferðini og ervinum.
Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Sigrid, Marin og Jógvan**